**Vitalij Petrov** *er 25 ára gamal og hevur altíð verið áhugaður í motorsporti. Hann fleiri ára royndir sum kappkoyrari við t.d. Formula 1600 og Euroseries 3000. Hann hevur eisini roynt seg við kappkoyring í Le Mans í Fraklandi og fleiri aðrastaðni í Evropa.*



**RUSSARI**

*Vitalij Petrov er tann fyrsti russarin sum nakrantið hevur luttikið í Formel 1 koyring*

# FORMEL 1




árini, var herfyri avger tikin um at lata Lada Danmark A/S aftur og gevast við at selja Lada. Seinastu 10 árini er seldir umleið 300 Lada bilar í Danmark.

Lada vóru nógv seldir í Danmark og eisini í Føroyum í 80-unum. Talan var um Lada við sama bilmodelli sum Fiat 124, men við Lada motori og teknikki. Lada verða tó framvegis seldir í Týsklandi við modellunum Kalina, Priora og Niva.

Lada verksmiðjan Avto-VAZ í Russlandi hevur annars stórar ætlanir viðvíkjandi bilaframleiðslu.

Málið er at framleiðslan skal trýfaldast næstu 10 árini.

Tað er alment kent at Vladimir Putin, sum hevur stóran áhuga fyri bilum og russiska bilaídnaðinum, hevur sett sær fyri at Lada bilarnir skulu verða fult á hædd við teir bestu vesturlendsku bilarnar um fimm ár.

## PUTIN OG BILAÍDNAÐURIN

Premierministarin í Russlandi Vladimir Putin hevur almannakunngjørt, at navnið Lada nú verður at síggja í sambandi við Formel 1 koyring.

Vladimir Putin, sum hevur stóran áhuga fyri bilum og russiska bilaídnaðinum, hevur sett sær fyri at Lada bilarnir skulu verða fult á hædd við teir bestu vesturlendsku bilarnar um fimm ár.

Vladmir Putin er føddur 7. oktober 1952. Hann varð valdur til president í Russlandi í 2000 og var presidentur til 2008. Síðan hevur hann verið premierministari í Russlandi.

